# At greina og tulka ævintýr

Tað er umráðandi at hava í huga, tá ið tú greinar og brúkar ein frymil, at frymilin bara er eitt hjálparamboð. Frymilin er ikki lagaður til eitt ávíst ævintýr, tí kann tað væl vera, at ikki alt, sum nevnt er í frymlinum, er at finna í einum og sama ævintýri. Brúka frymilin soleiðis, at hann hóskar júst til títt ævintýr og legg tað afturat ella tak tað burturúr, sum tú heldur, er viðkomandi ella óviðkomandi fyri tína greining.

GG. *Minst altíð til at vísa á dømi í ævintýrinum og at grundgeva fyri tínum uppáhaldum.*

## Um tekstaslagið

Ævintýr er tekstaslag, ið er partur av tí, sum vit nevna "**skaldskapur av mannamunni**" – eisini nevnt "munnmentir". Sí **Tekstasløg skaldskapur av mannamunni**, har ævintýr eru nærri umrødd.

## Byrjan

Les ævintýrið væl og virðiliga ígjøgnum.

- Kanna ókend orð í orðabók

## Um tekstin

Greið frá tí, sum tú veitst um tekstin, so sum

- tekstaslag
- hvat eitt ævintýr er
- hvør munur er á einum ævintýri og eini vanligari søgu
- høvund
- útgávuár

## Søgugongdin

Greið frá, hvør kjarnin í ævintýrinum er (t.e. søgugongdin stytt til fáar reglur).

## Søgubygging

Greið frá, hvussu ævintýrið er bygt upp.

- Hvussu byrjar tað?
- Er ævintýrið skipað við eini byrjan, einari miðju við hendingum og einum enda? Greið frá tí.
- Hvussu endar tað?
- Hvar er hæddin ella vendin?
- Er søgugongdin býtt upp í heima – úti – heima? Um so er, vís hetta býtið.
- Hvørjar hendingar fara fram í ævintýrinum, sum ikki eru í vanligum søgum?
- Hvørji tøl verða nevnd?
- Tú kanst mynda søgugongdina sum eina brúgv við byrjan, hendingar og enda

## Frásøgufólk

Er ævintýrið skrivað í 1., 2. ella 3. persóni?

Hvør er frásøgufólk?

Hvør ber sjónarhornið?

Eru persónarnir lýstir innanífrá, uttanífrá ella bæði?

## Tíðin

### Søgutíð

Nær fara hendingarnar í ævintýrinum fram? Vís á fyribrigdi, sum geva grundir fyri tíni tíðarfesting.

Hvussu long er søgutíðin? Tað er tíðin, sum gongur frá ævintýrið byrjar, og til tað endar.

Eru afturlítandi brot?

## Stað

Hvar fer ævintýrið fram? Greið frá tí, sum tú veitst um staðið/støðini.

- Hvar eru persónarnir staddir?
- Verða støð nevnd við navni?

## Persónslýsingar

- Hvørjir persónar/verur eru í ævintýrinum?
- Greið frá tí, sum tú veitst um teir.
- Hvør er høvuðspersónurin?
- Hvørjir eykapersónar eru?
- Hvør er hetjan í ævintýrinum?
- Greið frá sambandinum ímillum persónarnar.
- Brúka **aktantfrymilin** at lýsa sambandið ímillum persónarnar

**GG**. Tú finnur **aktantfrymilin** og frágreiðing um, hvussu hann kann brúkast her:
Sí slóðina til **Tekstasløg skaldskapur av mannamunni**

## Málið og skrivingarlagið

Hvat eyðkennir málið í ævintýrinum?

- Er málið gerandisligt ella háfloygt?
- Er stílurin knappur ella tungur? Vís á dømi.
- Hvørjir orðaflokkar eru serliga væl umboðaðir?
- Hvat verður serliga væl lýst?

## Myndamál

Eru myndamál og samanberingar í ævintýrinum? Vís á dømi í tekstinum

## Tulking og tema

Tak saman um tað, sum tín greining vísir. Vert er at geva hesum serligan ans, tá ið tú tulkar:

- Hvønn týdning hevur heitið á ævintýrinum?
- Hvørjir mótsetningar eru?
- Hvat skapar spenningin í ævintýrinum, og hvør er uppi ímóti hvørjum?
- Eisini kanst tú kanna, hvat persónar ella fyribrigdi umboða í ævintýrinum.

## Millumtekstleiki

Kennir tú aðrar tekstir (søgur, yrkingar, myndir, filmir ella annað), ið viðgera sama evni? Greið frá teimum.

## Boðskapur/hugburður

Hevur ævintýrið ein serligan boðskap til lesaran?

## Tín hugsan

Hvat heldur tú um ævintýrið? Grundgev tíni sjónarmið.
Er ævintýrið viðkomandi fyri okkum í dag? Hví/hví ikki?